## Flogbóltur í kvøld

Í kvøld klokkan 19 – og ikki í gjárkvøldið, sum vit av misgávum skrivaðu í blaðnum í gjár – spæla SÍ og ÍF í Eikliguni hjá monnum í høllini í Sørvági. Við sigri kann SÍ enn eina ferð fara frá Fleyr í kappingini um at koma í FM-finalurnar ímóti Mjølnir, sum hevur verið á odda tað mesta av kappingini. ÍF, sum støðugt hevur gjørt framstig, skal sum botnlið fyri ellivtu ferð á vøllin at jagstra fyrstu stigini í hesum kappingarárinum.



## Bíða eftir boðum

Ein av næstu døgunum verður greitt, um altjóða hondbóltsdómarapar okkara, Eyðun Samuelsen og Andrias F. Hansen, fáa boð um at døma onkrar av áttandapartsfinalunum í Europa Cup-kappingunum, sum verða um ein mánað. Sunnudagin dømdi Eyðun dystin millum Tjaldur og Stjørnuna saman við Hans Thomasen, tí Andrias hevur fingið ein skaða í ryggin. Hann væntar tó at verða klárur aftur um eina ella tvær vikur.




**Fútin hevur givið einum fótbóltsfjeppara í Eysturoynni eina ávaring fyri í øðini at hava sent einum dómara hesi hóttandi sms-boðini eftir ein dyst í september**
Montasja: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

# Gul kort frá fútanum

**At tað avgjørt ikki skal takast sum skemt, tá ein fótbóltsdómari verður hóttur við sms-boðum, hevur ein fótbóltsfjeppari í Eysturoynni fingið at sanna. Hann hevur nú fingið eina ávaring frá fútanum, sum samstundis staðfestir, at fjepparin er sekur**


einslistir@kallnet.fo

**Hilmar Jan Hansen**

Tað var mikukvøldið 16. september í fjør, tá fult umfar var spælt í Vodafonedeildini, at ein fótbóltsfjeppari í Eysturoynni gjørdist so argur inn á dómaran í einum av dystunum, at hann eftir dystin sendi dómaranum hesi smsboð: »Tú ert ein klovn. Um tú ikki leggur floytuna og kortini, kanst tú vænta tær eitt alvorligt besøk sunnukvøldið«.

Orðaljóðið var so mikið hóttandi, at málið endaði sum eitt politimál, tí hóast dómarar vanliga tola at hoyra eitt sindur av hvørjum, uttan at taka sær stórvegis tykni av tí, var hesin fjepparin farin so mikið um mark, at tað ikki bara kundi fara aftur við borðinum.

Eftir at hava ráðført seg við sakførara, gjørdi Dómarafelagið av at melda tilburðin. Felagið visti, hvør hevði sent sms-boðini, so tað var ikki so torført at finna fram til rætta viðkomandi. Síðani hevur málið koyrt sína gongd, men nú er fútin liðugur at viðgera málið.

Sum skilst, hava serligar umstøður gjørt seg galdandi, og tí hevur fútin gjørt eitt undantak frá vanligu siðvenjuni í slíkum málum, so talan í hesum føri bert verður um eina ávaring, hóast eingin ivi er um, at talan er um eitt brot á grein 266 í revsilógini.

Fótbóltsfjepparin sleppur sostatt í hesum føri við einum gulum korti, men úrskurðurin hjá fútanum er ikki minni greiður fyri tað. Har verður millum annað staðfest, at »…en advarsel er en strafferetlig afgørelse, der indebærer, at jeg anser [navnið á fjepparanum] skyldig i det forhold, der er rejst sigtelse for.«

Á heimasíðu sigur Fótbóltssambandið, at tað er sera væl nøgt við avgerðina, ið greitt sigur, at tað er lógarbrot at hótta dómara ella annan persón. – Vónandi fer hetta at hava við sær, at dómarar í framtíðini fara at fáa betri arbeiðsfrið, og at slíkar hóttanir ikki fara at verða sendar í framtíðini, sigur Fótbóltssambandið.

# NSÍ leitar eftir málverja

**– Tað kemur dátt við hjá okkum, at Meinhardt Joensen nú er farin aftur til B36, tí skotbráið at finna ein góðan málverja er so stutt. Men vit leita bæði í Føroyum og uttanlands eftir einum manni í hansara stað, sigur Andrias Lamhauge, formaður í NSÍ**

Sunnudagin kundi B36 boða frá, at felagið hevði gjørt ein tvey ára sáttmála við Meinhardt Joensen, sum í fjør vardi málið hjá NSÍ, men undan tí var málverji í B36 í 2008. B36 segði hetta vera eina góða loysn, tí teirra málverji síðsta kappingarár, Jóan Pauli Dahl Jakobsen, hevur boðað frá, at hann eftir summarfrítíðina fer niður at lesa.

Men so góð tíðindini eru fyri B36, líka so ring eru tey fyri NSÍ, sum hevði vónað, at Meinhardt fór at halda fram í Runavík hetta kappingarárið. Ikki minst, tí tíðin er farin at ganga undan, nú hópurin til komandi kappingarárið helst skal vera nøkulunda klárur.

– Tað kemur dátt við hjá okkum, at Meinhardt Joensen nú er farin aftur til B36, tí skotbráið at finna ein góðan málverja er so stutt. Vit hava í mong ár verið sera væl mannaðir við málverjum, so tí er tað serliga torført hjá okkum so seint at skula at finna ein, ið kann gera, at vit halda okkum á sama stigi, sum vit plaga, sigur Andrias Lamhauge, formaður í NSÍ.

– Men einki er at gera við tað, so nú leita vit bæði í Føroyum og uttanlands eftir einum nýggjum málverja. Vit harmast um, at Meinhardt fer frá okkum, tí vit hava verið sera glað fyri at havt hann í felagnum. Hetta er tó veruleikin, sum hann sær út nú, so vit verða noyddir at finna onkran í hansara stað.

Andrias Lamhauge sigur, at NSÍ frammanundan hevur ein ungan málverja, Kristian Joensen, sum hevur verið knýttur at fyrstaliðshópinum síðstu tvey árini, men at tað kanska er í so tíðliga longu at seta hann í málið í Vodafonedeildini, umframt at hann frammanundan er málverji hjá 1. deildarliðnum.

– Vit eru annars so gott sum komnir á mál við hópinum hjá okkum, ið ikki er so øgiliga nógv broyttur frá síðsta kappingarári. Tó vita vit, at Óli Hansen er givin, so umframt nýggjan málverja, skulu vit nokk hava ein spælara aftrat, áðrenn vit eru heilt til reiðar, sigur NSÍ-formaðurin.

**hil**



**Andrias Lamhauge harmast um, at Meinhardt Joensen ikki spælir við NSÍ komandi kappingarár, men staðfestir, at hetta er veruleikin og at felagið tí leitar eftir nýggjum málverja**
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir